# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um móðurmerkjakrabba í uvea

## Sjúkueyðkenni, ið skulu geva illgruna um móðurmerkjakrabba í uvea

Sjúkueyðkenni á móðurmerkjakrabba í eyganum eru ikki serliga eyðkend. Tað er m.a. versnað sjón, sjónsfeltsútfall og sjónsórógv. Hesi sjúkueyðkenni stava tó oftast frá øðrum sjúkum.

Um illgruni er um móðurmerkjakrabba í uvea, skal ávísing sendast til krabbameinsútgreining

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um móðurmerkjakrabba í uvea" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026